DAGSINS MEINING

Veljið fleiri kvinnur á ting

Altjóða kvinnudagurin 8. mars varð hildin um allan heim og eisini hjá okkum sjálvum. Skipað varð fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum. Eitt eru fundir og eitt eru góð orð. Spurningurin er: hvussu við gerðunum – hvussu við tí ítøkiliga úrslitinum av øllum hesum góðu orðum og røðum! Spurningurin um leiklutin hjá kvinnuni í føroyska samfelagnum er ein spurningur, ið eigur at verða til viðgerðar hvønn dag í árinum og ikki bara 8. mars. Og her mugu vit tíanverri eisini taka í egnan barm og viðganga, at heldur ikki fjølmiðlarnir í nóg stóran mun megna at seta kvinnuna nógv á dagskránna. Tað skal tí vera okkara vón, at vit megna hetta betur í tíðini, sum kemur, og vónandi er tiltak sum tað í Norðurlandahúsinum við til at minna okkum á hetta.

Kvinnurnar hava tað gott sum er. Okkum nýtist ikki hetta feministiska tvætlið eru tað nógvir føroyingar, sum hugsa og siga. Og tíanverri eru hetta oftani tankar, ið mong gera sær, tá tey hoyra kvinnur tosa um teirra sjálvsagda rætt og pláss í samfelagnum. Tað er uppá ein máta lagnunar speisemi, at tær kvinnur, sum veruliga vilja brúka tíð og orku til at tala søk kvinnurnar, eru tær, sum skapa mótvilja og andsøgn millum fólkið. Ikki tí at hesar ikki hava rætt ella eru skilagóðar, men meira hetta, at fólk flest troyttast av at hoyra tey somu júka aftur og aftur um somu mál, tað verið seg kvinnuspurningar, fullveldi, privatisering, sosialismu osfr. Hetta er ein av vansunum við demokratiinum, at tey, sum skilagott og ærligt royna at tala søk teirra veiku og minnilutana, gerast sjálvi offur í tí stóru fjøldini.

Okkum dámar so væl at fortelja fremmandum , at okkara ting er eitt av heimsins elstu. Men hvat er tað fyri eitt ting! Hyggja vit rundan um okkum síggja vit, hvussu fleiri av okkara grannalondum eru komin nógv longur. Har eru kvinnurnar vælmannaðar á tingi og í leiðandi størvum. Tíðin er komin til, at henda gongd eisini fær fótafesti her heima, og at vit heldur enn at fara í andstøðu til tær kvinnur, sum hava dirvi og vilja til at tala søk alra kvinnurnar, taka ímóti teimum við opnum ørmum – lurta og hugsa. Boðskapurin er greiður: veljið fleiri kvinnur á Føroya Løgting. Ikki bara tí tær eru kvinnur, men tí at eitt parlament í einum demokratiskum og upplýstum landi, við virðing fyri sær sjálvum, skal verða umboðað av kvinnum eins væl monnum. Og at hava fleiri kvinnur í leiðandi politiskum sum vinnuligum størvum er eitt sunnheitstekin fyri eitt samfelag. Í mongum týðandi og álvarsligum málum er brúk fyri kvinnuni. Her ikki minst, tá talan er um mongu bleytu virðini í samfelagnum. Hvat menn enn halda um seg sjálvar, so er tað ein óreingilig sannroynd. Eitt upplýst og demokratiskt samfelag, sum í 21. øld bara verður stýrt og rikið av monnum, er ikki eitt frískt samfelag. Tað er eitt samfelag við slagsíðu. Eitt samfelag, sum ikki fær tað besta av tí besta burtur úr sínum borgarum. Tí skal okkara boð verða: føroyingar veljið fleiri kvinnur á ting.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eru vit fyrireikað til oljuvinnuna?

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins

Oljuvinna er ein nýggj avbjóðing til ta Føroysku tjóðina. Ein avbjóðing –0 vit eiga at taka ímóti og bjóða vælkomnari!Ein tíðaravmarkað avbjóðing, sum vit komandi árini skulu læra okkum at liva við.

Undir fyrireikingunum til oljuvinnuna, hava vit tosað um, kannað og brúkt nógva orku upp á havbotnin, havumhvørvið, havnarløg, kaikantar, tyrlupallar, vinnumøguleikar og tillík. Alt tí tað er neyðugt, at vit fyrireika okkum væl og kenna til avleiðingarnar av oljuvinnuni.

Enn hava vit ikki kannað ella tosað um, hvørjar avleiðingar oljuvinnan fer at hava á nærsamfelagið. Ella hvørjar avleiðingar fer vinnan at hava á bústaðarmynstrið, familjulívið – mentunarlívið. Ella á støðuna hjá føroysku kvinnuni? Vit hava eitt einstáttað bústaðarmynstur í Føroyum – eitt kostnaðarmikið bústaðarmynstur. Vit mugu skipa ein bústaðarpolitikk, sum hóskar til tað lívið vit liva í dag. Vit skulu hava fleiri valmøguleikar!

Hvat við kvinnunum, sum koma hendavegin, tí maðurin arbeiðir í oljuvinnuni. Oftast úti á boripallinum! Í øðrum oljulondum siga tey, at kvinnurnar oftast gerast taparin, táið familjan flytir. Oljufamiljur flyta ofta og hava innrættað sítt familjulív eftir arbeiðsumstøðunum hjá manninum.

Kvinnurnar eru ofta vælútbúnar, men hava valt at fylgja manninum nøkur ár. Tær hava úr at gera ta fyrstu tíðina í einum fremmandum landi. Tí tá eru tað tær, sum eru um heimið og børnini. Táið børnini byrja at falla til – heimið er komið upp á pláss – standa tær einsamallar, duga ikki málið og kenna kanska ongan granna. Eingin er heima dagtímarnar.

Familjurnar vanta, at tá ið tey koma til eitt nýtt land, so er pláss fyri børnunum á dagstovnum og skúlum. Børnini skulu undirvísast á enskum og undirvísast móðurmálinum.

Ein onnur avbjóðing er okkara mentan. Fólk, sum starvast í oljuvinnuni koma ymsastaðni frá. Flest øll frá størri samfeløgum enn okkara. Hvørji krøv fara tey at seta til eitt nú frítíðartilboð, matstovu0r, skeinkiloyvi, náttarlívið o.a. Eg haldi, at tað er sera umráðandi, at vit verja og menna okkara mentan, samstundis sum vit laga okkum til tað nýggju tíðina.

Mín spurningur er, hvat gera vit fyri at fyrireika og eggja føroyskum gentunum at luttaka í oljuvinnuni? Hava vit fyrireikað okkum nóg væl á trivnaðarøkinum, mentanarøkinum og sosialaøkinum? Eftir mínum tykki kunnu vit ongantíð ov skjótt byrja at fyrireika okkum á hesum økjum. Eg fari at viðgera hetta evni meira seinni.

www.lindenskov.com
elin@lindenskov.com

Tey bleytu virðini hægri ræðfesting á fíggjarlógini

Joan Ziskason
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Lurtaði ein dagin eftur tingmonnunum, har teir umræddu eykajáttanarlógina. Eg taki fult undir við uppskotinum frá Javnaðarflokkinum, um at Landssjúkrahúsið skal fáa nýggjar sengur. Saknaði tó, at eingin tosaði um annað viðlíkahald á Landssjúkrahúsinum, t.d. at eitt ávíst krónutal bleiv sett av hvørt ár, til viðlíkahald. Og ikki bara á Landssjúkrahúsinum, men eisini til Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús.

Vit hava í dag ongan orðaðan heilsupolitikk. Hetta má gerast nakað við, tí so leingi vit ongan orðaðan heilsupolitikk hava, hava vit eingi mál fyri, hvat brúkarin/sjúklingurin kann krevja av sínum heilsuverkið, og umvent Her hugsi eg bæði innan sjúkrahúsini, og á tí primera økinum. Rættast hevði verið, at sett ein arbeiðsbólk, sum fekk ábyrgdina av at orða ein slíkan.

Í nógv ár, hava starvsfólk á almennum arbeiðsplássum sagt sína ónøgd, um teirra arbeiðsumhvørvið. So hvørt, sum trupulleikarnir hava stungið seg upp, hava teir, ikki uttan stríð, verið loystir. Vit hava í dag ein alment orðaðan starvsfólkapolitikk, men hvør fylgir hesum upp ? Vøkur orð á einumappíri, skapa ikki arbeiðsgleði.

Havi, av góðum grundum, mangan hoyrt sjúkrasystrar siga, at tær fáa ov lítið í løn. "Hevði lønin verið betri, hevði verið hugaligari at fari til arbeiðis". Men hetta er ikki allur sannleikin. Ein viðurkenning av tí arbeiði ein ger, gevur størri arbeiðsgleði. Vit mugu nokk viðganga, at tá kvinnur, sum arbeiða innanfyri tey bleytu virðini, skulu greiða frá hvat tær gera, hava tær ein forklæringstrupulleika. Trupulleikin gert ikki minni av, at ov fáar kvinnur sita á tingi. Ov fáar til at fáa ræðfest tey bleytu viðrini hægri á fíggjarlógini, enn tey verða gjørd í dag. Eg vil pástanda, at um fleiri kvinnur sótu á Føroya løgtingi seinastu nógvu árini, so hevði stóri trupulleikin viðvíkjandi manglandi røktarheims- og barnaansingarplássum, ikki verið so stórur í dag, ja, hann hevði kanska verið loystur.

Verið eg vald á ting til komandi løgtingsval, vil eg verða við til at føra ein skinsaman og varnan búskapar- og fíggjarpolitikk, sum ger at ráð verða til, at tey bleytu virðini fáa eina hægri ræðfesting á fíggjarlógini.

www.jozi@post.olivant.fo

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mík. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mík. kl. 15	Mík. kl. 12	Mík. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Fullveldishugað fylkjast um Tjóðveldisflokkin

Leivur Hansen
Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi

Í tjóðveldisflokkinum er ongin slingur í valsinum í fullveldismálinum. Flokkurin heldur rimmarfast um hetta stavnhald.

Tíverri kann tað sama ikki sigast um hinar báðar samgonguflokkarnar, sum - skulu vit trúgva seinastu veljarakanningini - afturfyri kunnu rokna við at verða harðliga revsaðir av veljarunum á komandi vali.

Líkt er til, at tað hevur eydnast donsku stjórnini og skutilsveinum hennara her á landi at fáa spjaðing í fullveldisvongin.

Sostatt er fryktandi fyri, at hesi samgonguni ikki verður lív lagað eftir komandi val, og og at fullveldiskósin tískil er í vanda.

Hetta eigur at fáa allar fullveldishugaðar føroyingar at fylkjast um tjóðveldisflokkin, so ikki slepst uttan um hann, tá nýggj samgonga skal skipast.

Fullveldismálið er eitt mál fyri alt Føroya fólk. Tað snýr seg um at skipa eitt fólkaræði, har vit sjálvi skulu hava evsta vald og evstu ábyrgd av landi okkara.

Hóast innanhýsis klandur og stríð hevur merkt samgongustevið serliga hetta seinasta árið, hevur henda samgongan kortini megnað at tikið stór stig fram ímóti einum frælsum Føroyum.

Løgtingið hevur fyri fyrstu ferð staðfest, at føroyingar eru ein tjóð við sjálvsavgerðarrætti, og á hesum grundarlagi hevur løgtingið samtykt eina miðvísa fullveldisætlan (Samtyktin um sjálvstýri Føroya fólks).

Skúlamál og almenn forsorg eru komin á føroyskar hendur, og samstundis er blokkstuðulin úr Danmark skerdur við 366 milj. kr.

Skipasýnið er yvirtikið eins og øll leiting, bjarging og tyrlutænasta í Føroyum.

Avtala er gjørd um, at løgregla, rættarskipan, útlendingamál og sivilrættur koma á føroyskar hendur.

Avtala er klár at undirskriva um at fáa Fólkakirkjuna á føroyskar hendur í næstum.

Viðmerkjast skal, at eftir stjórnarskiftið í Danmark (og eftir at javnaðarflokkurin misti umboðið á fólkatingi), hevur gingið hópin lættari at fremja ætlanina hjá samgonguni.

Í fíggjar- og búskaparmálum er kósin hildin til ein sjálvberandi búskap, har vit kortini raðfesta og bøta um tey økir í samfelagnum,ið hava verið forsømd undir heimastýrisbúskapinum.

Er vilja til tess, kunnu vit - innan eitt valskeið er runnið aftrat - loysa okkum frá danskari umsiting og danskari figging.

Kemur tjóðveldisflokkurin ikki sterkur á ting og heldur kósina, so kann vinnarin í hesum spæli gerast danska stjórnin og annars øll tey, sum ikki vilja hava eina avgerð um, hvørið ræður í Føroyum.

Tað krevur stríð, dirvi og áræði at vinna á mál.
Og sjálvandi tína undirtøku.

Eigur samkynsligt lindi at hava leysar teymar?

Grannalondini farin langt av leið.

Absalon Absalonsen

Nógv verður á okkara døgum tosað og skrivað um fyribrigdi at vera samkyntur.

Fyrr varð hetta hildið at vera bæði synd og skomm, og lítið varð tosa um hetta, fólk flest fingu seg illa at nevna hesi viðurskifti, og mettu hetta at vera ræðuliga synd bæði móti Guds boðum og móti náttúrini, sum tað sambart orði Guds júst er.

Nú verður hetta fyribrigdið nógv meir umtalað, og tað verður borið í bøtuflaka fyri hesum, ført verður fram, at hetta er náttúrligt og viðfødt.

Tað, sum fær meg at festa hetta á blað, er ein sending, eg hoyrdi í útlendskum útvarpi.

Í grannalondum okkara er lógligt hjá samkyndum at ganga saman í skrástett paralag, teimun er loyvt at ættleiða børn, og tey kunna enntá fáa kirkjunnar vælsignilsi til til at fremja slíkt, sum Harrans orð harðliga ávarðar ímóti. Hetta fær bæði meg og mangan annan at ógvast við. Higartil hevur Harrin vart okkara lítla samfelag móti slíkum lógum.

Allar syndir eru viðføddar.

Í vissan mun má tó ásannast, at slíkt er viðfødt, tað eru til dømis stuldur morð og hatur eisini, tað er okkum í holdið borið, sum tikið verur til, og tað sigur Guds orð okkum við.Men líka frá barnsbeini fær menniskja at vita frá foreldrum og øðrum og ikki minst frá síni egnu samvitsku hvat, ið er rætt og hvat, ið ikki er rætt.

Um vit nú søgdu við tey, ið hava lindi at stjala, at hatta er í finasta lagi, stjalið tit bara, hatta er viðfødt, einki er at gera við tað, fáið endiliga ikki ringa samvitsku av hasum. Ella um onkur skuldi havt hug at dripi onkran, hvat um nú varð sagt við ein slíkan , hatta skalt tú bara gera, hatta er tín náttúra, og hvat við teimum, ið gera seg inn á børn,.er tað ikki viðfødt??

Nú rista vit øll við høvdinum, sjálvandi. Men tað er júst hetta, ið sagt verður teimum, sum hava kynsliga girnd eftir persónum av sama kyni sum tey sjálvi. Mangan verður hetta ført fram av høgt mettum fólkum, ið hava stóra ávirkan á onnur, og man ikki júst tað verða ársøkin til, at talið av sonevndum samkyndum veksur í stórum.

Guds orð er ikki í iva, har verður hetta mett sum deyðasynd, og øll við viðring fyri Guds orði eiga at ávarða staðiliga móti hesum, líka væl sum móti stuldri, lygnum, falsan, harðskapi og øðrum syndum, sum vit eiga at venda okkum frá.

Sálarlív okkara kann samanberast við ein urtagarð.

At hava kynsligt samband við persón av sama kyni sum ein sjálvur kann ikki forsvarast við, at tað er viðfødt, tað eru allar aðrar syndir eisini.Vit hava øll eina synduga náttúru at dragast við, vit kunnu samanberast við ein urtagarð, har ókrútið altíð hevur hug at gera innrás, og tað ræður tí um at lúka tað burt, áðrenn tað festir rót.

Við atliti til samkynsligt samband tykist mær, at vit hava við sera vandamikið ókrút at gera, sum tíverri fær loyvi at festa djúpari og djúpari røtur, og verður ikki av øllum alvi roynt at lúka tað burt, meðan tíð er, fer tað at forkoma okkum. Tað hendi í Sodoma , og slíkur og líknandi ólevnaður var helst høvuðsársøk til, at bæði griska og rómverska ríkið gingu til grundar.Tey hildu, tað einki vera vert at hava kunnskapin um Gud , og vóru tí givin upp til sinni sum einki er vert , menn drivu skemdarverk við monnum, og kvinnurnar skiftu tann náttúrliga umgangin um við tann, sum er ímóti náttúruni. (Rómbr. Kap 1 ør. 18 og fr.)

Gud letur seg ikki spotta, og hann sigur, at tað sum menniskja sáar, skal tað eisini heysta,

(Gal.6,7) gævi øll Guds fólk her á landi stóðu saman í stríðnum móti hesum ókrúti. Harvið er als ikki meint, at tey, ið verða freistað av hesi ávísu synd, eru ókrút, sum skal beinast burtur, tvørturímóti, hesi eins og onnur, ið kanska verða meiri freista av øðrum syndum, eru høgt elskað av Gudi. Kanska eru tey sjúk og hava viðgerð fyri neyðini, tað kunnu onnur meta um.

Harrin til reiðar at fyrigeva og reinsa.

Men Harrin er til reiðar at fyrigeva alt , eins og hann gjørdi móti kvinnuni ið tikin var í hori, men hann segði við hana , far avstað og synda ikki longur (Jóh. Ev 8,11)

Játta vit syndir okkara, er hann trúfastur og rættvísur og fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi. (1. Johs. br. 1,10.)

Hetta er galdamdi fyri allar syndarar og allar syndir. Náði Guds er ómetalig í Kristi Jesusi, og fevnir eisini um tann størsta syndaran. (1. Tim. 1, 14-15)

Tann stóri vansin er, at ført verður fram, at samkynsligt samband ikki er synd, men náttúrligt, harvið verður hetta drepandi ókrútið lívga og tæða, so tað til endan oyðir henda dýrabara urtagarð, ið mannasálin er.

Ónytturnar í Havn

Heðin Mortensen
løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins

Tað stendur ikki í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu, at høvuðstaðurin "skal niður við nakkanum", sum tikið verður til. Men hjá þortum av samgonguni hevur tað nærmast verið ein fragd at arbeiða ímóti øllum tí, sum hevur við høvuðstaðarøkið at gera.

Øll minnast ivaleyst, tá landsstýrismaðurin í figgjarmálum undir verkfallinum í 1999 skýrdi verkfallsfólkini fyri tey, sum: "ganga og mala ímillum húsini í Havn".

Soleiðis hevur støðan verið á so mongum økjum. Landsstýrisfólkini hava havt tað sum fragd at flyta almennar stovnar úr høvuðstaðnum til aðrar partar av landinum. Ongantíð hevur verið hugsað um, hvat tað kostar. Tað skal bara gerast.

At tað er hugaligt og gott at búgva í høvuðstaðnum, eru kortini fólk flest samd um. Ongantíð í nýggjari tíð hevur trýstið á húsa- og íbúðarmarknaðin verið so stórt her sum nú.

Vit, sum dagliga arbeiða við bæði kommunupolitikki og landspolitikki, fegnast um gongdina, hóast tað setur stór krøv til kommununa.

Vit høvdu fegin viljað gjørt møguleikarnar betri til at fingið bústaðir til vega, men politiska skipanin vil ikki stuðla okkum í tí arbeiðnum.

Vit hava ætlanir um at byggja íbúðir á Berjabrekku, tann sonevnda Berjabrekka 3 ætlanin.

Avtala er gjørd við Húsalánsgrunnin og Íbúðargrunnin, og ein sjálvsognarstovnur er stovnaður, sum skal standa fyri byggingini.

Men enn einaferð eru tað landspolitikararnir, sum ikki vilja veita eina hjálpandi hond. Hóast tað ikki er meir enn náturligt, at fólk sum seta seg fyri eina slíka íbúð, fáa sama rentustuðul, sum annars er galdandi, so vil landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki vika seg.

Vit í sambandsflokkinum hava lagt uppskot fyri løgtingið um at broyta lógina um rentustuðul og lógina um meirvirðisgjald, so øll verða líka fyri lógini. Vónandi verða uppskotini samtykt, so farast kann undir Berjabrekku 3, og eisini undir aðrar ætlanir av sama slag.

Taka vit eina íbúð, sum er 70 fermetrar, so verður hon 1500 kr. bíligari um mánaðin, um uppskotini vinna frama.

Tað eru nógvir pengar, tí vinna uppskotini ikki frama, so verður leigan útvið 5.000 kr. um mánaðin, og tað er ov nógv.

Áhugin fyri íbúðunum er stórur. Hevði almenna mótstøðan ikki verið so stór, so kundu íbúðirnar longu verið bygdar.

Men tað letur til, at serliga landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil einki gera fyri at betra um viðurskiftini hjá "ónytturnum í Havn".

Tað kunnu tit sum veljarar gera nakað við. Tit kunnu og eiga at velja aðrar flokkar enn teir, sum seinastu fýra árini hava stjórnað landinum. Politikarar, sum als einki hava gjørt fyri at betra um m.a. bústaðarviðurskiftini hjá vanliga fólkinum, eiga nú at verða skiftir út.

Vit í Sambandsflokkinum hava fólkið fremst í huganum.